# VÁGA KOMMUNA

## KUNNINGARSKRIV 2009



- Byggingin av nýggja **barnagarðinum á Stórutrøð** í Miðvági. Har verða pláss fyri uml. 150 børnum. Arbeiðið hevur gingið toluliga væl, ætlanin er, at barnagarðurin skal standa liðugur í 2010.
- Soppavøkstur er staðfestur á skúlanum á Giljanesi. Avgerð var tikin um, at skræða alt innan úr niðastu hæddini í summarfrítíðini. Arbeitt verður við at gera ætlan um, hvussu skúlin skal útbyggjast. Fyri at nøkta bráðfeingis hølistørvin, hevur kommunan keypt tvær pavilliongir at nýta til skúlastovur.
- Arbeitt verður við **ferðslutrygdarætlanini** fyri høvuðsvegin gjøgnum Miðvág og Sandavág. Ein ferðsluoyggj er gjørd á Giljavegi í Sandavági. Eisini eru ein oyggj og ein vegbunga gjørd á Jatnavegi í Miðvági. Ein rundkoyring verður gjørd á vegamótinum Leitisvegur – Vatnavegur – Skaldavegur í Miðvági.
- Vegbungur eru gjørdar á Nullinum í Sandavági.
- Arbeitt verður við at gera miðstaðarøki í Sandavági. Hetta arbeiðið væntast at vera liðugt í 2010. Eisini verður arbeitt við at hampa um í viðarlundini og at laða garð á Sjóberinum.
- Eftirspurningurin eftir grundstykkjum er minkaður í seinastuni. Kommunan eigur í løtuni 9 byggibúgvin grundstykkir, 1 í Miðvági og 8 í Sandavági.
- Nakrir vegir eru asfalteraðir í 2009. Nevnast kunnu m.a. Tvørgarðsgøta, Rygsgøta, Tungureynsgøta v.m. í Miðvági.
- Á havnarøkinum eru vakmyndatól sett upp at betra um trygdina í økinum og at verja móti herverki.
- Í gongubreytina fram við Giljavegi í Sandavági eru vatn- og kloakkleiðingar lagdar.
- Í samband við, at Vestanstevnan var í Sandavági, var lagdur stórur dentur á at fríðka um og rudda í bygdini. Vestanstevnan var sera væl eydnað.

**Onnur arbeiðir, sum eru í gongd í kommununi og skulu gerast liðug, eru í høvuðsheitum:**

- Á Kirkjabø í Miðvági skal fyrrverandi Hornabrekka fáast liðug.
- Í bátahylinum skulu ljósmastrar setast upp og tær eldru bátabrúgvarnar høvuðsumvælast.
- Við innsiglingina til Miðvágs/Sandavágs Havn skal nýggjur viti setast upp.
- Kirkjugarðurin í Sandavági er um at vera fullur. Arbeitt verður við ætlan um at gera nýggjan kirkjugarð.

**Lánini:** Nú so nógv arbeiðir eru gjørd og eru í gerð, hevur verið neyðugt at taka nýtt lán. Tó eiga vit eisini nakrar krónur á bók. Niðanfyri hava vit sett gongdina síðan 1995:

| Miðvágur og Vatnsoyrar | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Mill. kr.** | **1995** | **2000** | **2001** | **2002** | **2003** |
| **Lán** | 47,9 | 26,1 | 21,9 | 17,6 | 13,2 |
| **Nettoskuld** | 46,2 | 20,0 | 9,0 | 6,8 | 2,2 |

| Mill. kr. | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Lán** | 8,7 | 5,1 | 2,5 | 0,5 | 6,0 |
| **Nettoskuld** | -2,2 | -5,0 | -7,0 | -3,3 | -4,2 |

| Sandavágur | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Mill. kr.** | **1998** | **2000** | **2001** | **2002** | **2003** |
| **Lán** | 9,9 | 8,1 | 6,9 | 5,8 | 4,5 |
| **Nettoskuld** | 4,0 | -0,9 | -3,1 | -2,7 | -2,8 |

| Mill. kr. | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Lán** | 3,3 | 2,4 | 1,6 | 0,4 | 10,2 |
| **Nettoskuld** | -5,0 | 6,0 | -4,8 | -5,4 | 3,6 |

Skuldin hjá Vága kommunu við árslok 2009 er kr. 24,8 mill. Nettoskuldin er umleið kr. 16 mill.



**Virksemið:** Í 2009 kom eitt nýtt skip, **Atlantsfarið**, til Miðvágs. Tað frøast vit um í hesum tíðum, tá arbeiðsplássini í kommununi ikki eru so nógv, sum vit kundu ynskt okkum.
Í samband við ætlanir um at víðka **aliøki,** er innsiglingin til Miðvágs/ Sandavágs Havn smalkað. Hetta skuldi eisini givið økt virksemið í kommunu-ni.
Tíverri liggur **flakavirkið** enn stilt. Okkara vón er, at vinnulívsfólk í Vágum kunnu síggja møguleikar í virkinum, soleiðis at nógv virksemi aftur verður á havnarøkinum.
Fyri Vága Kommunu er talið á persónum, sum fáa **arbeiðsloysisstuðul** frá Arbeiðsloysisskipanini í desember 2009:

Menn: 22 Kvinnur: 26 Tilsamans: 48

**Skattskylduga** inntøkan í kommununi veksur støðugt sum víst niðanfyri:

| Miðvágur og Vatnsoyrar | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Ár** | **1994** | **1995** | **1996** | **1997** | **1998** | **1999** | **2000** | **2001** |
| **Mill.** | 74,4 | 77,1 | 81,2 | 86,7 | 88,7 | 95,8 | 111,6 | 114,2 |
| **Ár** | **2002** | **2003** | **2004** | **2005** | **2006** | **2007** | **2008** | |
| **Mill.** | 129,2 | 136,1 | 138,3 | 141,6 | 157,5 | 172,7 | 179,8 | |

| Sandavágur | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Ár** | **1994** | **1995** | **1996** | **1997** | **1998** | **1999** | **2000** | **2001** |
| **Mill.** | 52,6 | 57,2 | 59,5 | 63,2 | 65,5 | 72,3 | 81,0 | 82,7 |
| **Ár** | **2002** | **2003** | **2004** | **2005** | **2006** | **2007** | **2008** | |
| **Mill.** | 93,3 | 96,5 | 97,2 | 105,0 | 116,5 | 127,9 | 135,8 | |

Skatturin verður ikki endaliga uppgjørdur fyrr enn í oktobur árið eftir, so tølini fyri 2009 kenna vit ikki enn.

**Skattaprosentið:** Kommunustýrið samtykti treyðugt at hækka skatta-prosentið við 0,5%. Fyri fíggjarárið 2010 er raksturin tálmaður í mun til 2009, meðan íløgurnar er vaksnar. Fyri at fíggja íløgurnar, er neyðugt við lántøku. Hetta førir til øktar rentuútreiðslur. Størstu einstøku íløgurnar í 2010 eru 14,3 mill. kr. til at gera barnagarðin í Miðvági lidnan og 10,0 mill. kr. til nútímans-gerð av skúlanum á Giljanesi.




**Barnafrádrátturin** í 2010 verður tann sami, **kr. 4.000,-** fyri hvørt barnið.

**Roknskapurin**: Niðanfyri hava vit víst ársúrslitið áðrenn fígging í ávikavist Miðvágs og Sandavágs kommunum.

| Miðvágur og Vatnsoyrar | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Ár** | **1995** | **1996** | **1997** | **1998** | **1999** | **2000** | **2001** |
| **Mill. kr.** | 17,9 | 14,3 | 15,1 | 17,6 | 17,3 | 22,7 | 20,0 |
| **Ár** | **2002** | **2003** | **2004** | **2005** | **2006** | **2007** | **2008** |
| **Mill. kr.** | 21,3 | 22,1 | 23,0 | 23,0 | 27,2 | 32,1 | 35,8 |

| Sandavágur | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Ár** | **1995** | **1996** | **1997** | **1998** | **1999** | **2000** | **2001** |
| **Mill. kr.** | | | | 11,8 | 12,8 | 16,4 | 14,3 |
| **Ár** | **2002** | **2003** | **2004** | **2005** | **2006** | **2007** | **2008** |
| **Mill. kr.** | 17,5 | 18,3 | 16,6 | 18,3 | 23,9 | 25,2 | 35,7 |

| Vága kommuna | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Ár** | **2009** | **2010** | | | |
| **Mill. kr.** | 53 (fyribils) | 79 (ætlan) | | | |




**Fólkatalið**, sum minkaði nógv í kreppuárunum, er komið uppaftur á eitt meira natúrligt støði. Gongdin seinastu árini er víst niðanfyri: (pr. 31/12)

**Miðvágur og Vatnsoyrar**

| **Ár** | **1990** | **1991** | **1992** | **1993** | **1994** | **1995** | **1996** | **1997** | **1998** | **1999** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Fólk** | 1066 | 1045 | 1022 | 994 | 972 | 959 | 958 | 963 | 951 | 953 |

| **Ár** | **2000** | **2001** | **2002** | **2003** | **2004** | **2005** | **2006** | **2007** | **2008** | **2009** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Fólk** | 973 | 1001 | 1024 | 1057 | 1089 | 1102 | 1104 | 1107 | 1123 | 1113 |

**Sandavágur**

| **Ár** | **1990** | **1991** | **1992** | **1993** | **1994** | **1995** | **1996** | **1997** | **1998** | **1999** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Fólk** | 733 | 726 | 723 | 693 | 668 | 669 | 662 | 674 | 682 | 689 |

| **Ár** | **2000** | **2001** | **2002** | **2003** | **2004** | **2005** | **2006** | **2007** | **2008** | **2009** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Fólk** | 677 | 689 | 722 | 730 | 739 | 767 | 797 | 805 | 833 | 826 |

**Barnaansingin**: Miðvágs- og Sandavágs kommunur hava nú í fleiri ár nøktað tørvin á barnaansing.

Barnaansingin í Miðvági er skipa soleiðis: Børn yngri enn 3 ár eru í **dagrøkt**, børn millum 3 og 5 ár í **barnagarðinum** í **Gamla Skúla**. Tey 6 ára gomlu verða ansað í **Heiðastovu. Frítíðaransingin** heldur til í **á Gjónni**.




Barnaansingin í Sandavági er skipa soleiðis: Børn yngri enn 5 ár vera ansað í **Sóljugarði**. Tey 6 ára gomlu verða ansað í **Sóljustovu**. **Frítíðaransingin** heldur til í frítíðar- og ungdómshúsinum á **Loftinum**.
Útreiðslurnar av barnaansingini eru nógv vaksnar seinastu árini. Niðanfyri hava vit víst gongdina:

**Miðvágs kommuna**

| **Ár** | **1995** | **1996** | **1997** | **1998** | **1999** | **2000** | **2001** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Mill. kr.** | 0,974 | 0,917 | 1.025 | 1.290 | 1.437 | 1.635 | 2.226 |

| **Ár** | **2002** | **2003** | **2004** | **2005** | **2006** | **2007** | **2008** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Mill. kr.** | 2.798 | 3.469 | 5.366 | 6.222 | 7.044 | 8.026 | 8.500 |

**Sandavágs kommuna**

| **Ár** | **1995** | **1996** | **1997** | **1998** | **1999** | **2000** | **2001** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Mill. kr.** | | | | 0,884 | 1.096 | 1.407 | 1.922 |

| **Ár** | **2002** | **2003** | **2004** | **2005** | **2006** | **2007** | **2008** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Mill. kr.** | 2.296 | 2.967 | 4.296 | 4.984 | 6.160 | 7.286 | 8.228 |




Barnaansingin í 2009 kemur at kosta umleið kr. 17,8 milliónir krónur.
Afturat hesum rindaði kommunan í 2009 góðar kr. 2,3 mill. til barnaverndar-tænastuna og kr. 500.000 til ungdómshúsið Loftið.

**Ungdómshúsið Loftið** byrjaði sítt virksemi í januar 2007. Ætlanin við einum ungdómshúsi var at bjóða øllum ungum frá 4.fl. og eldri eitt øðrvísi forum í teirra frítíð, har tey kunna vera saman við sínum vinfólki og læra onnur ung at kenna. Loftið er eisini eitt stað, har tey ungu hava møguleika at spæla ymisk spøl, hyggja eftir filmi, spæla gittar, keypa sær okkurt at eta o.s.fr.
Høvuðsendamálið er at bjóða teimum ungu eitt stað, har tey trívast, fáa kreativitetin í hásæti, felags og persónligar upplivingar, har tey kunna práta um alt og einki saman við teimum vaksnu, sum arbeiða her.

Skipað verður fyri **fimleiki fyri pensionistar á Sýnuni** í Miðvági. Hetta tiltak hevur fingið sera stóra undirtøku, og frøast vit um tað.

**Djóraupptøkufólk**. Samstarvsavtala verður í løtuni gjørd millum Føroya Landfúta og Vága kommunu um upptøku av leysum hundum og um upptøku av øðrum djórum í Vága kommunu. Avtalan kemur væntandi í gildi tann 1. februar 2010.

| Bingjuplássini eru opin hesar tíðir | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| | Týsdag | Mikudag | Hósdag | Fríggjadag | Leygardag |
| Miðvágur | 17 - 18 | 16 – 17 | | 17 - 19 | 15 – 16 |
| Sandavágur | 17 - 18 | | 17 – 18 | 17 - 19 | |
| Allir borgarar í kommununi kunna ***frítt*** lata húsarhaldsrusk á bingjuplássini. | | | | | |

Upplatingartíðirnar eru eisini á heimasíðuni vaga.fo og í IRF kalendaranum.

**Hálka** er ein trupulleiki um vetrarnar. Í hálku hevur kommunan nú í nøkur ár stroytt salt á teir vegir, har mest ferðsla er. Eisini er kavi grivin eftir førimuni. Kommunan hevur sett nakrar saltkassar við ymsar brekkur í bygdunum. Kassarnir eru myrkagrønir, og ein spaki liggur í hvørjum. Ætlanin er at fólk, sum brúka brekkurnar, sjálvi skulu stroya salt á, tá gler er, og kommunan ikki hevur nátt at salta.

**Kommunustýrið** hevur havt 20 fundir í farna ári og hevur viðgjørt 274 mál, fíggjarnevndin hevur havt 19 fundir og viðgjørt 179 mál, tekniska nevnd hevur havt 21 fundir og viðgjørt 209 mál, trivnaðarnevndin hevur havt 13 fundir og viðgjørt 56 mál og mentunarnevndin hevur havt 10 fundir og viðgjørt 46 mál.

**Avgreiðslutíðirnar á kommunuskrivstovuni eru:**
**Mánadag til fríggjadag frá kl. $10^{00}$ til $15^{00}$.**

**TAÐ BER TIL AT FÁA AVTALU UM FUND VIÐ BORGAR-STJÓRAN VIÐ AT VENDA SÆR TIL SKRIVSTOVUNA Á TLF. 34 44 00 MILLUM KL. $13^{00}$ OG $15^{00}$.**

**Hetta** var í høvuðsheitum gongdin í 2009. Tey, sum ynskja at vita meira, eru vælkomin á kommunuskrivstovuna at fáa fleiri upplýsingar.

Vit eru nú í einum nýggjum tíðarskeiði, har vit úr Miðvági, Sandavági og Vatnsoyrum hava tikið okkum saman í eina felags **Vága kommunu.**
Vit síggja fram til eitt gott og mennandi samstarv til gagns fyri allar borgarar okkara. Hóast nógv verður tosað um heimsbúskapin í hesum døgum, vilja vit framhaldandi við dirvi líta frameftir og ikki missa mótið. Við tí virkisfúsa fólki, sum her býr, vilja vit saman taka lógvatak og soleiðis standa sterkari.

*Vit takka borgarum okkara fyri tann stuðul og positiva anda, sum tit hava víst kommunustýrinum.*

*Gott nýggjár og Guds signing ynskja vit tykkum øllum.*

*Sandavági, tann 31. desembur 2009*

